# ð virðismiklasta botnfiskaslagið



*Tað er virðismikið taltilfar, sum er til skjals um fiskiveiðina í Norðuratlantshavi seinastu hundrað árini*

tykist vera rættiliga jøvn øll árini.

- Undir seinna heimsbardaga var veiðan av hesum fiskasløgum sera lítil, og soleiðis var eisini í kreppuárunum seinast í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum. Tí er hugsandi, at hetta er tann nøgd, sum kann veiðast av hesum fiskasløgum um árið, sigur Hjalti.

Seinast í sekstiárunum byrjaði fiskiskapurin eftir kongafiski, blálongu og svartkalva á djúpum vatni. Hesin fiskiskapur, sum mest hevur verið við teimum størru lemmatrolarunum, vaks fram til miðskeiðis í áttatiárunum, men síðan er heildarveiðan av hesum fiskasløgum minkað munandi.



## Upsi og toskur

Botnfiskaslagið, sum mest verður fiskað av, er upsi.

- Hóast veiða av upsa er fráboðað at kalla alla øldina, byrjaði veruligur fiskiskapur eftir upsa undir Føroyum ikki fyrr enn seinast í sekstiárunum - í fyrsta lagi av týskum og seinni fronskum fiskiskipum. Tá ið fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar, byrjaðu føroysk skip at fiska upsa av fullum alvi - og síðan tá hava okkara skip fiskað at kalla allan upsan, sum veiddur verður við Føroyar, sigur Hjalti.

Í ritinum leggur hann dent á, at toskur alla hesa øldina hevur verið virðismiklasta slagi av botnfiski við Føroyar.

- Undan 1977, tá ið fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar, varð nógvur toskur veiddur við Føroyar av útlendskum fiskiførum, serliga skotum og onglendingum.

Hjalti vísir á, at eitt serligt fyribrigdi við toskaveiðini kring Føroyar er, at veiðan við tveimum undantøkum alla øldina hevur ligið millum 20.000 og 40.000 tons.

- Bestu árini er heildarveiðan komin upp á 40.000 tons, og vánaligastu árini hevur hon verið umleið 20.000 tons.

Hann sigur, at undantøkini eru undir seinna heimsbardaga og kreppuárini seinast í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum, tá ið toskaveiðan var óvanliga lítil.





*Er lítil toskur at fáa - og lítil hýsa, gongur ikki væl hjá línuskipunum og útróðrarflotanum*

- Undan fyrra heimsbardaga var mesta veiðan av toski við Føroyar fiskað av bretskum fiskiskipum, men undir seinna heimsbardaga minkaði bretska veiðan burtur í einki, og føroysk fiskiskip tóku yvir. Undir bardaganum tyktist stovnurin at hava ment seg munandi og í 1918, tá ið fiskiskapurin bert var við føroyskum fiskiskipum, kom veiðan upp á stívliga 20.000 tons.

Hjalti vísir á, at í 1919 var føroyska veiðan 25.000 tons og samlaða veiðan av toski undir Føroyum heili 42.000 tons.

- Tá ið bretsku fiskiskipini komu aftur higar at fiska, minkaði føroyski parturin av veiðini eftir toski heilt nógv.

## Pelagiska veiðan

Størstu broytingarnar í veiðinøgd hava verið í pelagisku fiskasløgunum.

- Sild varð nógv fiskað í fimti-og sekstiárunum og so aftur miðskeiðis í nítiárunum. Veiðan eftir svartkjafti byrjaði í sjeytiárunum og veiðan eftir makreli í áttatiárunum. Onkur ár fæst eitt sløg av brislingi á Tangafirði og Skálafjørðinum. Onkur ár hevur lodna verið fiskað norðanfyri, og onkur ár er rossamakrelur veiddur við føroyar.

Hjalti í Jákupsstovu vísir á, at nógv tann størsti parturin av veiðini av pelagisku fiskasløgunum er svartkjaftur, og serliga síðan ár 2000 er veiðan eftir svartkjafti vaksin heilt nógv.

## Talvur við veiði

Í snotuliga bóklinginum, Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár, eru talvur, sum lýsa veiðina eftir hesum fiskasløgum: Sild, brislingi, gulllaksi, hýsu, upsa, toski, hvítingi, hvítingsbróðir, svartkjafti, brosmu, longu, blálongu, havtasku, kongafiski, steinbíti, makreli, kalva, svartkalva, reyðsprøku, tungu. Eisini eru talvur, sum lýsa veiðina eftir hummara og jákupsskel.

Í talvum sæst eisini, hvussu nógv ymisku londini hava fiskað av ymiskum fiskasløgum við Føroyar.